# FØROYINGAR VIRÐA IKKI PARKERINGSBÁSAR FYRI RØRSLUTARNAÐ

**Eitt parkeringskort er eitt serligt kort, sum verður útgivið til persónar við rørslutarni. Persónar, sum hava hetta kortið, kunnu parkera á parkeringsplássum fyri rørslutarnað. Parkeringskortið skal liggja sjónligt í forrútinum á bilinum klárt til eftirlit. Hetta má bert nýtast í sambandi við flutning av handhavanum av kortinum.**

- Eg skilji ikki, hví fólk í Føroyum ikki kunnu vísa virðing fyri rørslutarnaðum, sigur Barba Sandá Nielsen, sum ferð aftaná ferð sær, at vanligir bilar parkera á parkeringspláss, sum eru ætlað henni og soni hennara

PÆTUR HJALMAR EVENSSON

- Tað virkar ikki sum, at fólk leggja nakað í, um vanligir bilar parkera á parkeringsbásum, sum eru ætlaðir rørslutarnaðum. Onkur má taka ábyrgd, tá hetta hendir. Eg kann ikki sjálv flyta bilin.

Soleiðis sigur Barba Sandá Nielsen, sum er mamma at einum trý ára gomlum dreingi við rørslutarni.

Hon upplivir javnan, at parkeringsbásar til fólk við rørslutarni eru upptiknir av vanligum persónbilum, sum ikki hava parkeringskort. Tá hon í vikuni sá ein bil uttan parkeringskort standa parkeraðan á tveimum básum fyri rørslutarnað í senn, valdi hon at gera vart við seg á Facebook. Hon legði mynd út av parkeringini og skrivaði m.a., at hetta ikki var eitt eindømi um, at fólk velja dovinskap framum virðing.

- Eg síggi hatta so ofta, og eg verði bara so irriterað, tá eg síggi sovorðið. Vit sluppu ikki inn á basin, so vit máttu bara finna eitt annað stað, sigur Barba Sandá Nielsen.

Hetta var í køini til Smyril, har parkeringsbásarnir fyri rørslutarnað geva einum møguleika at sleppa inn fyrst, av tí at har annars er so trongt at parkera á dekkinum.

## Manglandi virðing og dovinskapur

Hon heldur ikki, at rørslutarnað verða vird á sama hátt sum aðrir borgarar í samfelagnum, og tað eru hesar parkeringarnar dømi um.

- Eg skilji ikki, hví fólk í Føroyum ikki kunnu vísa virðing fyri rørslutarnaðum. Eg síggi hatta næstan dagliga í Føroyum. Fólk vilja stilla seg har, so tey kunnu sleppa skjótari framat har, sum tey vilja. Hetta er manglandi virðing og dovinskapur á hægsta stigi, sigur hon.

Barba Sandá Nielsen og sonurin eru ofta á Landsjúkrahúsinum til kanningar, og eisini har hava tey trupult við at fáa pláss á básunum fyri rørslutarnað, tí aðrir bilar hava tikið tey.

- Parkeringsplássini fyri rørslutarnað á Landsjúkrahúsinum verða eisini nógv misbrúkt, tí har er so ringt at fáa parkeringspláss. Men eg veit, at parkeringsvaktir ganga har og geva bøtur.

## - Tey veiku detta niður ímillum

Ein trupulleiki við at parkera á vanligum parkeringsbásum er, tá rampan til koyristólin skal úr bilinum. Parkeringsbásarnir fyri rørslutarnað eru væl størri enn vanligu básarnir, soleiðis at pláss er fyri at fáa rampuna og koyristólin út. Tað er ofta ikki pláss til hetta á fleiri av vanligu parkeringsbásunum og fyri tey, ið hava rampu aftanfyri í bilinum, kemur rampan beinleiðis út á vegin, har bilar koyra.

- Eg haldi ikki, fólk hugsa um sovorðið, sigur Barba Sandá Nielsen og leggur aftrat, at rørslutarnað eisini eru avmarkað í mun til t.d. at fara á matstovur, ið liggja høgt uppi, har eingin elevator er.

Hon vísir á, at tað eru onnur, sum eru í somu og verri støðu enn hon og sonurin. Hon kann gott bera sonin hjá sær frá parkeringsplássinum, men tað eru eisini tey, ið eru einsamøll og mugu trilla seg sjálvi allan vegin, har tey skulu. Tí er tað spell, um parkeringsplássini fyri tey eru upptikin, og tey verða noydd at parkera longri vekk frá teimum ymsu inngongdunum. Um viðkomandi hevur viðføri við sær, gerst teinurin enn strævnari.

- Onkursvegna hugsar mann mest um tey, sum ikki eru rørslutarnað. Tey verða altíð sett fremst. Eg haldi, tað er synd, at tey veiku í samfelagnum detta niður ímillum.



**23 ára gamla Barba Sandá Nielsen við soninum, Adrian**

Ofta hava tey ikki eina sterka rødd at forsvara seg sjálvi við. Tað eri t.d. eg, sum má forsvara sonin hjá mær, greiðir hon frá.

## Eingin tekur ábyrgd

Hon hevði frætt frá øðrum, at bilurin hevði staðið har allan dag. Hetta eigur ikki at kunna bera til, heldur hon og sær gjarna, at mann skuldi tikið við harðari hond um ólógligar parkeringar sum hesa.

- Eg hoyrdi, at bilurin hevur staðið har allan dag. Har burdi verið onkur, sum kom og flutti bilin. Onkur má vel hava ábyrgdina av at fjerna hann, tá hann stendur á har. Har vóru enntá parkeringspláss beint við síðuna av. Viðkomandi skuldi fingið eina dýra bót fyri hatta, heldur Barba Sandá Nielsen.

Tað er ikki bara hon, ið følir manglandi virðingina av parkeringsbásum fyri fólk við rørslutarni. Kenningar hjá henni í sama umhvørvi hava eisini upplivað hetta.

**Í Føroyum er ikki munur á, um parkerað verður ólógliga á vanligum parkeringsbásum ella á parkeringsbásum fyri rørslutarnað. Bótin er 200 krónur í báðum førum. Í Danmark fær mann eina bót áljóðandi 1020 krónur fyri ólógliga parkering á básum fyri rørslutarnað – dupult so nógv sum vanliga bótin.**



**Í bygningskunngerðini hjá Landsverk frá 2017 standa ásetingar fyri byggingina í Tórshavnar Kommunu. Har stendur skrivað, at krav er, at eitt hóskandi tal av parkeringsplássum til fólk við rørslutarni skal gerast, tá parkeringsøki verða gjørd. Parkeringspláss fyri rørslutarnað skulu vera so nær við inngongd sum gjørligt. Básarnir skulu vera 3,5 m x 5 m til støddar. Teir størru básarnir til bilar við rampu skulu hava støddina 4,5 m x 8 m. Hæddarmunur millum parkeringsøki og annað øki má hægst vera 2,5 cm.**

- Vit, sum eru í hesum lívinum, hava eitt øgiliga tætt samband, og vit møta øll javnan líknandi tilburðum.

## MEGD kennir væl til trupulleikan

Tóra við Keldu er forkvinna í MEGD, sum umsitur útgávu og endurnýggjan av parkeringskorti. Hon fortelur, at tey fleiri ferðir hava fingið áheitanir um trupulleikan við ólógligum parkeringum í básum fyri rørslutarnað.

- Vit hoyra frá teimum, sum hava parkeringskort, at tá tey skulu parkera í básunum, so kemur tað meira enn so fyri, at har standa bilar, sum ikki hava parkeringskort. Hatta er ein avbjóðing, sum er ordiliga keðilig, sigur Tóra við Keldu.

Hon vónar, at folk í Føroyum fáa størri virðing fyri parkeringsplássunum hjá rørslutarnaðum, tí har eru fólk, ið hava brúk fyri teimum.

- Vit í MEGD eru virkuliga glað fyri, at parkeringsplássini verða brúkt. Tí er okkara ynski sum meginfelag sjálvandi, at hasar reglarnar verða hildnar millum føroyingar. Vit mugu hava virðing fyri, at tað eru nøkur fólk í samfelagnum, sum hava brúk fyri hasum básunum, sigur hon.

Tóra við Keldu heldur, at hetta er ein spurningur um at ávirka hugburðin hjá fólki. Hon meinar ikki, at tað er ein beinleiðis loysn at geva dýrari bøtur, sjálvt um tað kundi verið ein møguleiki.

- Tað at fara at økja um bótina er møguliga ein gongd leið. Men eg hugsi, at tað sigur nokkso nógv um samfelagið, um mann skal arbeiða fyri at hækka bøturnar. Eg vænti, at rætti vegurin er at broyta hugburðin hjá fólki, og at gera betri vart við, at har stilla vit okkum ikki, sigur Tóra við Keldu.

| Tal av parkeringsplássum á parkeringsøkinum | Parkeringspláss til fólk við rørslutarni *(4,5x8,0m)* | Parkeringspláss til fólk við rørslutarni *(3,5x5,0m)* |
|---|---|---|
| 1-9 | | 1 |
| 10-25 | 1 | 1 |
| 26-50 | 1 | 2 |
| 51-75 | 2 | 2 |
| 76-100 | 2 | 3 |
| 101-150 | 3 | 3 |
| 151-200 | 3 | 4 |
| 201-500 | 4 | 4 |
| 501-1000 | 4 | 5 |

**Talið av parkeringsplássum til fólk við rørslutarni verða gjørd eftir hesari vegleiðingini hjá Landsverki**